

www.oljan.fo

**Jan Müller** 27 - 04 - 2013

# Scrabster oljuútgerðarhavn fyri økið vestan fyri Hetland

Nógva oljuvirksemið vestan fyri Hetland setir nú eisini ferð á veitingarvirksemið á landi. NorSea Group og Scrabster Harbour Trust i Caithness hava gjørt avtalu, sum fer at hava við sær stórar íløgur og nýggj arbeiðspláss fyri lokala búskapin í økinum. Sambært avtaluni verður roynt at skapa nýtt virksemi í norðastu havnini í Skotlandi og gera hesa um til eina veruliga útgerðarhavn fyri olju- og gassvinnuna í økinum. Vit síggja fram til at samstarva við Scrabster Harbour Trust um at menna forrætningsmøguleikarnar í verandi havn í Scrabster, sum liggur sera væl fyri, tá hugsað verður um framtíðar virksemið til havs í økinum. Vit fara at taka lokalsamfelagið við í okkara ætlanir, sigur John e. Stangeland, konsernstóri í NorSea Group í einum tiðindaskrivi. Í fyrsta umfari verður bygt ein nútímans djúpvatnkei við einum goymsluøki uppá 11.573 kvadratmetrar. William Calder, formaður í Scrabster Harbour Trust, sigur seg vera sera væl nøgdan við komandi samstarvið, sum fer at veita tænastur og vørur til olju- og gassøkini vestan fyri Hetland.